## - Riis var dopaður

Í 1996 vann danski súkklarin og núverandi leiðarin av súkklufelagnum, Team CSC, størstu súkklukapping í heiminum, Tour de France. Síðstu árini hava doping ákærur felt nógvar súkklarar, og nú sigur ein fyrrverandi limur av týska felagnum Telekom, Jef D'Hont, at Riis var fullur í doping. – Hæmatokritvirðið hjá Riis var óvanliga høgt undir Tour de France í 1996. Eg bað hann ansa sær, tí hann fekk gikt av øllum tí, hann tók. Hann var fullur í doping. Súkklararnir spurdu sjálvir um EPO, og so syrgdu okkara læknar fyri, at teir fingu tað.

## Vikuskiftiskapping í Havn

Eins og í fjør, skipaði Havnar Telvingarfelag fyri FM upphiting. Fjúrtan telvarar vóru við, eingin omanfyri 1800 í rating, men hinvegin var púra opið og eingin beinleiðis favorittur.

Kappingin varð eisini jøvn, og endin varð, at Jaspur T. Gaard vann við 4 stigum av 5 møguligum. Hjalti T. Jógvansson fekk eins nógv stig, men mótstøðustigini hjá Jaspuri vóru eitt vet betri. Nr. 3 varð Birgi Hansen.

# Blindtalv á høgum støði

**Tólv stórmeistarar leika í hesum døgum eina serliga kapping, har blindtalv og kviktalv verða samansjóðað**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*carl_eli@hotmail.com*




*Vladimir Kramnir hevur verið í stórformi higartil í stóru blindtalvkappingini*

Telvað verður í Monaco, og hendan eftirhondini siðvanda kapping kallast Melody Amber Tournament. Teir sterku hava altíð verið hugtiknir av hesu kapping, har man bæði leikar kviktalv (25 min. hvør) og blindtalv móti sama mótstøðumanni. Góðar peningavirðislønir lokka sjálvandi eisini elitutelvarar til Monaco.

Anand, Kramnik, Aronian, Ivanchuk, Svidler, Morozevich og Magnus Carlsen eru nakrir av navnframu telvarunum, ið telva fyri dollarar og heiður í ár.

Stuttligt er serliga at síggja hvussu stjørnurnar royna seg í blintalvi. Tað hendir seg at teir í einum leiki eitt nú missa frúgv - men annars er telvingin merkt av ótrúligum presisum útrokningum. Eisini djúpt úti í endatalvum telva teir ómetaliga væl.

Skipanin í blintalvi er, at hvør telvari situr við teldu, har eitt tómt talvborð er á skerminum. Teir flyta so leikin við músuni, og mótstøðumaðurin sær leikta leikin á skerminum, og stutt eftir verður talvborðið aftur tómt fyri talvfólki.

### Kramnik, og so hinir

Kramnik legði bestur út, varð hóttur á stigatalvuni miðskeiðis í kappingini, men nú eftir 8. umfar er hann trygt fremstur við 12 stigum. Kramnik hevur telvað óvanliga væl, síðan hann vann HM í heyst. Ratingfavoritturin Anand á 2. plássi er hálvtannað stig aftanfyri mæta russan. Ivanchuk, Svidler og Aronian er í hølunum á Anand.

Serliga í blindtalvi hevur Kramnik verið í flokki fyri seg. Hann hevur vunnið sær 7,5 stig av 8 í blindtalvi, meðan hann hevur verið meira hóvligur í kviktalvi; 4,5 stig av 8. Anand hevur, sum væntað, ognað sær flestu stigini í kviktalvi, nevniliga 6,5.

Magnus prógvar enn einaferð, at hann er komin fyri at verða í heimselituni. Hann vann 1,5-0,5 á Gelfand í 8. umfari, og hevur eins og Peter Leko 7,5 stig. Trý umfør resta í.

## Blindtalvið hesa vikuna

Kramnik er helst besti blindtelvari í heiminum, og í 4. umfari hevði hann eisini fyrimun ímóti Anand seint í miðspælinum, men í blindtalvi er einki avgjørt fyrrenn kongurin er settur skák og mát. Anand sá tó knappliga trøll á alljósum degi, og taptið talvið við brestin.

### Kramnik – Anand (4. umfar)




28...Rid6? Anand heldur seg hava flutt ein góðan leik…29.Bxe6 Rf2?? Anand hevur ivaleyst hildið, at hvíti rókurin stóð á f2! 30.Rxf2 og Anand gavst 1-0.

### Melody Amber Tournament Støðan eftir 8. umfar

| | |
|---|---|
| Kramnik | 12,0 |
| Anand | 10,5 |
| Ivanchuk. | 10,0 |
| Svidler | 9,5 |
| Aronian | 9,5 |
| Morozevich | 8,0 |
| Gelfand | 8,0 |
| Carlsen | 7,5 |
| Leko | 7,5 |
| Radjabov | 6,0 |
| Vallejo | 4,0 |
| Van Wely | 3,5 |

**Champions League, bólkaspælið**

| Bólkur A | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Pólland | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 13 |
| 2 Finnland | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 7 | 2 | 5 | 11 |
| 3 Portugal | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 12 | 3 | 9 | 10 |
| 4 Serbia | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 10 |
| 5 Belgia | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 4 | 6 | -2 | 7 |
| 6 Kasakhstan | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 3 | 8 | -5 | 5 |
| 7 Armenia | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 0 | 5 | -5 | 1 |
| 8 Aserbadjan | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 1 | 13 | -12 | 1 |

| Bólkur B | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skotland | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 11 | 4 | 7 | 12 |
| 2 Frakland | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 12 | 2 | 10 | 12 |
| 3 Ukraina | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 4 Italia | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 5 Litava | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 6 Georgia | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 10 | 11 | -1 | 3 |
| 7 Føroyar | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 0 | 18 | -18 | 0 |

| Bólkur C | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Turkaland | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 12 | 1 | 11 | 12 |
| 2 Grikkaland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 3 Bosnia-Hersegovina | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 10 | 12 | -2 | 7 |
| 4 Noreg | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 5 Malta | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 9 | -4 | 4 |
| 6 Ungarn | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 5 | 8 | -3 | 3 |
| 7 Moldova | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 3 | 11 | -8 | 2 |

| Bólkur D | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 21 | 3 | 18 | 13 |
| 2 Kekkia | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 14 | 4 | 10 | 10 |
| 3 Írland | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 10 |
| 4 Slovakia | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 9 |
| 5 Kypros | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 9 | 15 | -6 | 4 |
| 6 Wales | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 5 | 9 | -4 | 3 |
| 7 San Marino | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 1 | 27 | -26 | 0 |

| Bólkur E | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kroatia | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 15 | 4 | 11 | 13 |
| 2 Russland | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 11 |
| 3 Ongland | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 6 | 2 | 4 | 8 |
| 4 Ísrael | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 8 |
| 5 Makedonia | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 5 | 5 | 0 | 7 |
| 6 Estland | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 0 | 6 | -6 | 0 |
| 7 Andorra | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 1 | 19 | -18 | 0 |

| Bólkur F | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 12 |
| 2 Norðurírland | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 6 | 2 | 10 |
| 3 Danmark | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 2 | 5 | 7 |
| 4 Spania | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 6 |
| 5 Letland | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 6 Ísland | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 7 Liktenstein | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 2 | 15 | -13 | 0 |

| Bólkur G | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Holland | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 7 | 2 | 5 | 11 |
| 2 Bulgaria | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 3 Rumenia | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 4 Hvítarussland | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 5 Slovenia | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 4 |
| 6 Albania | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 2 |
| 7 Luksemburg | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 1 | 6 | -5 | 0 |